# Fiskiskipið Kúrberg til sølu

Við hesum verður fiskiskipið Kúrberg lýst til sølu. BRT 75,38 og NRT 25,59. L 22,410 m, B 6,250 m, D 2,890 m. Skipið er bygt á Tórshavnar Skipasmiðju í 1950.

Skipið hevur fiskiloyvi í bólki 4B, og hevur í fiskiárinum 2009/2010 fingið tillutað 119,74 fiskidagar.

Selt verður um nøktandi boð fæst. Áhugað kunnu venda sær til Jógvan E. Ellefsen, advokat, jee@lawfirm.fo. Skipið kann síggjast eftir nærri avtalu.

Sosialurin 341800

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4
100 TÓRSHAVN
TLF. 203040, FAX. 203041
E-MAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR



Lesið Sosialin


# KUNNGERÐ

## Serstakar byggisamtyktir fyri matr. nr 4c á Sundi og matr. nr. 1458a, Tórshavn

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 24. mars 2011 hevur samtykt uppskot til serstakar byggisamtyktir fyri økið til bygging av neystum á Sundi og fyri matr. nr. 1458a, Tórshavn.

**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MATR. NR. 4C Á SUNDI**

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um uppsetan av rammum og treytum, sum skulu yvirhaldast í sambandi við skipan og bygging á økinum.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um ognina 4c á Sundi.

**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MATR. NR. 1458A, TÓRSHAVN**

Serstaka byggisamtyktin snýr seg skipan og bygging á økinum 1458a við Sundsvegin.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um ognina 1458a, Tórshavn.

**FRAMLØGA**

Tilfar, sum lýsir uppskotini til serstøku byggisamtyktirnar liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 4. til og við 2. mai 2011, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 23. mai 2011.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Leiðari til nýggjan Frítíðarskúla

www.torshavn.fo

## Frítíðarskúlin í Sankta Frans skúla søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna, at byrja 1. juni 2011.

Frítíðarskúlin er normeraður til 48 børn úr forskúlanum.

**VIT BJÓÐA**

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran og ítrótturin kunnu fáa stóran leiklut í gerandisdegnum
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarar

**VIT VÆNTA AT TÚ**

- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- er kveikjandi og megnar at motivera starvsfólkini
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, skúlan og foreldur
- dugir væl at samskifta
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**

Umsókn saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 18. apríl 2011.

**MEIRA FÆST AT VITA**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, ella Katrin Petersen, deildarleiðara, telefon 302010.

**Onnur leys størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Pedagogur** – Dagstovnin við Velbastaðvegin
Umsóknarfreist 26.04.2011

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA